NORÐOYA SPARIKASSI

# HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2009

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. +298 475000
Fax +298 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Saltangará
Heiðavegur 21
FO-600 Saltangará
Tel. +298 475000
Fax +298 476012

Deildin í Tórshavn
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 475000
Fax +298 476015

## UM SPARIKASSAN

**Sparikassin**
er sjálveigandi stovnur. Hvørki stovnarar ella onnur eru ánarar av peningaogn ella avlopi sparikassans.

**Avlop sparikassans**
verður - burtursæð frá tí, sum verður nýtt til vælgerandi og almenngagnlig endamál – lagt afturat eginpeningi sparikassans, alt til tryggjan av sparipeninginum.

**Í sparikassanum**
eru tygum altíð vælkomin, og starvsfólkið her er til reiðar at geva tygum leiðbeiningar og upplýsingar í fíggjarspurningum.

## INNIHALDSYVIRLIT

| | |
|---|---|
| Lykla- og høvuðstøl | 5 |
| Hálvársfrágreiðing 1. hálvár | 6 |
| Leiðsluátekning | 8 |
| Rakstrarroknskapur 1. hálvár | 9 |
| Fíggjarstøða hin 30. juni | 10 |
| Viðmerkingar | 11 |

# LYKLA- OG HØVUÐSTØL

| Lyklatøl | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 27,1 | 20,0 | 17,0 | 17,4 | 15,1 |
| Kjarnukapitalprosent | 27,1 | 20,0 | 17,0 | 17,4 | 15,1 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 3,9 | 2,5 | 6,3 | -0,4 | -5,3 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 3,1 | 2,0 | 5,2 | -0,3 | -4,4 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,53 | 1,38 | 1,79 | 0,97 | 0,72 |
| Rentuváði | 1,5 | 2,5 | 1,1 | 1,3 | 0,5 |
| Gjaldoyrastøða | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 111,3 | 100,7 | 117,1 | 112,8 | 94,2 |
| Útlán i mun til eginpening | 3,9 | 4,4 | 5,2 | 5,5 | 7,4 |
| Hálvársútlánsvøkstur í árinum | 8,0 | 13,2 | 12,4 | 1,1 | 3,1 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 73,9 | 85,7 | 20,4 | 51,7 | 125,2 |
| Stórir kundar tilsamans | 22,8 | 49,2 | 57,2 | 52,4 | 93,1 |
| Burturleggingarprosent | 2,9 | 1,7 | 1,1 | 1,3 | 2,5 |
| Hálvárstaps- og burturleggingarprosent | 0,2 | 0,1 | 0,0 | 0,3 | 0,9 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 29.576 | 30.407 | 42.569 | 38.556 | 32.104 |
| Virðisjavnan | -577 | -4.255 | 3.057 | -5.435 | 502 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 0 | 0 | 0 | -499 | 0 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 384 | 217 | 211 | 391 | 802 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **29.383** | **26.369** | **45.837** | **33.013** | **33.408** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 16.544 | 17.367 | 25.558 | 26.320 | 27.531 |
| Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum | 475 | 725 | 1.381 | 1.924 | 1.633 |
| Niðurskrivingar uppá útlán | 2.155 | 1.079 | -1.276 | 6.700 | 17.165 |
| **Hálvársúrslit áðrenn skatt** | **10.210** | **7.198** | **20.174** | **-1.931** | **-12.921** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 1.048.271 | 1.257.577 | 1.690.575 | 1.837.567 | 1.916.709 |
| Virðisbrøv | 108.948 | 236.774 | 149.085 | 251.980 | 142.800 |
| Innlán | 970.432 | 1.271.842 | 1.461.588 | 1.660.994 | 2.082.667 |
| Javni | 1.251.594 | 1.577.574 | 1.966.696 | 2.249.445 | 2.455.071 |
| Eginpeningur | 267.767 | 288.989 | 326.794 | 325.489 | 265.321 |

*Samanberingartøl fyri árini 2005 til 2008 eru ikki tillagað broytingum í nýttum roknskaparhátti.*

# HÁLVÁRSFRÁGREIÐING 1. HÁLVÁR

Úrslitið fyrra hálvár 2009 hjá Norðoya Sparikassa gjørdist eitt hall uppá 10,8 mió.kr. Høvuðsorsøkin til at roknskapur sparikassans gevur hall er, at niðurskrivingar sparikassans móti tapi av útlánum framvegis liggja á einum høgum støði, hóast tær eru minkaðar munandi í mun til 2. hálvár 2008.

## Inntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar vóru 32 mió.kr. 1. hálvár 2009. Hetta er ein lækking uppá 6 mió.kr. í mun til sama tíðarskeið í 2008. Høvuðsorsøkin til hetta er, at rentumarginalur sparikassans hevur verið lægri í 2009 enn í 2008. Somuleiðis eru inntøkurnar av kostnaði og provisjónum lækkaðar.

## Virðisjavnan

Sparikassin hevur í 2009 ein vinning av virðisjavnan av lánsbrøvum, partabrøvum og gjaldoyra uppá ½ mió. kr.

## Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk, umsiting og aðrar vanligar útreiðslur vóru 1. hálvár 2009 27 mió. kr., sum er eitt vet hægri enn í 2008. Her eru útreiðslur í samband við Bankapakka I uppá 3,6 mió.kr. íroknaðar.

## Niðurskrivingar uppá útlán

Netto niðurskrivingar uppá útlán vóru 17,2 mió. kr. 1. hálvár 2009 móti 6,7 mió. kr. sama tíðarskeið í 2008. Hóast tað í 2009 eru týðilig tekin um, at afturgongdin á mongum økjum er steðgað, og at avmarkað framgongd er staðfest á fleiri vinnuøkjum, hevur sparikassin, við at meta um váða og framtíðarútlit annars, niðurskrivað og sett av móti tapi uppá útlán 17,2 mió.kr.

Tveir triðingar av útlánum sparikassans eru sethúsa- og privatlán, og hava vit staðfest, at bæði gjaldsevni og gjaldsvilji hjá privatkundum eru á einum sera høgum støði.

Vinnulán standa fyri 1/3 av útlánum sparikassans, og er tað í høvuðsheitum uppá hesi útlán, at niðurskrivingar eru gjørdar bæði í 2008 og 1. hálvár 2009.

## Innlán

Innlánið vaks við 25 % úr 1.661 mió. kr. í 2008 til 2.083 mió. kr. í 2009.

## Útlán

Útlánið vaks við 4 % úr 1.838 mió. kr. í 2008 til 1.917 mió. kr. í 2009. Harumframt eru ábyrgdir og aðrar skyldur sparikassans lækkaðar við 225 mió.kr. úr 301 mió.kr. til 76 mió.kr. Hetta kemst av, at sparikassin hevur valt at taka øll vinnulig uttanlandslán heim.

Um hugt verður eftir útlánum, ábyrgdum og skyldum tilsamans er talan um eina lækking uppá 7 % úr 2.139 mió.kr. í 2008 til 1.993 mió.kr. í 2009.

Útlánsprosent sparikassans er nú 94 %, og er hetta í samsvar við politikk sparikassans um at útlánsprosentið skal vera á einum hóskandi støði niðanfyri 100 %.



## Gjaldføri

Gjaldføri sparikassans er sera gott, og var tað meiri enn tað tvífalt lógarinnar krøv pr. 30. juni 2009, svarandi til ein gjaldførisyvirdekning uppá 125 %.

## Eginpeningur og solvensur

Eginpeningur sparikassans er nú 265 mió.kr. Solvensur sparikassans er góður, og var hann pr. 30. juni 2009 15,1 %. Sparikassin hevur avgjørt at søkja um kapitalinnskot undir bankapakka II. Hetta kemur at hækka solvens sparikassans við 3 %, so hann verður 18,1 % og eginpeningin við 50 mió.kr., so hann verður 315 mió.kr.

## Nýttur roknskaparháttur

Hálvársfrásøgn fyri 1. hálvár 2009 hjá Norðoya Sparikassa er gjørd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi, umframt kunngerð frá Fíggjareftirlitinum um framløgu av roknskapi fyri peningastovnar við virkni frá 1. januar 2009.

Nýtti roknskaparháttur hjá Norðoya Sparikassa er broyttur samsvarandi nýggju kunngerðini og skulu niðanfyri nevnast fylgjandi broytingar:

- Útlán verða í fyrstu atløgu bókað til dagsvirði íroknað stovningarkostnað, og við frádrátti av útreiðslum, sum hava beinleiðis tilknýti til stovnanina. Stovningarkostnaðurin verður tikin við sum rentuinntøka yvir afturgjaldstíðina. Í aðru atløgu verða útlán gjørd upp til amortiserað kostvirði.
- Niðurskrivingar (fyrr burturleggingar) uppá útlán verða gjørdar út frá einari ítøkiligari meting av hvørjum útláni sær ella bólkar av lánum. Niðurskrivingar verða bert gjørdar, um staðfest er ein uttanveltað orsøk til virðislækkan.
- Íløguognir verða í fyrstu atløgu bókaðar til útveganarvirði. Í aðru atløgu verða íløguognirnar uppgjørdar til dagsvirði. Dagsvirði verður grundað á avkasti av íløguognini.
- Fastogn til egna nýtslu verða í fyrstu atløgu bókað til útveganarvirði. Í aðru atløgu verða hesar ognir uppgjørdar til eitt endurmett virði, sum svarar til dagsvirði við frádrátti av avskrivingum.
- Sparikassin roknar ikki longur leigu av egnum ognum. Henda innanhýsis leiga var bókað millum aðrar inntøkur og aðrar umsitingarútreiðslur.

Samanberingartøl eru tillagað broytingunum í nýtta roknskaparháttinum við undantøku av samaberingartali fyri útlán 1. hálvár 2008. Sparikassin hevur í hesum føri brúkt áseting í kunngerðini um tillaging av nýtta roknskaparháttinum frá ársbyrjan 2009.

Tillaging til nýggju ásetingarnar bera í sær, at eginpeningur sparikassans við ársbyrjan 2009 minkar við tilsamans tkr. 13.779. Nýggi eginpeningurin við ársbyrjan verður sostatt tkr. 275.278.

Umframt broytingar í nýttum roknskaparhátti, eru eisini broytingar í uppsetan av rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, viðmerkingum o.a.

## LEIÐSLUÁTEKNING

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrásøgn fyri 1. hálvár 2009 fyri Norðoya Sparikassa. Hálvársfrásøgnin er greidd samsvarandi lóg um fíggjarligt virksemi, umframt kunngerð frá Fíggjareftirlitinum um framløgu av roknskapi fyri peningastovnar.

Tað er okkara fatan, at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av stovnsins ognum, skyldum og fíggjarstøðu pr. 30. juni og úrslitinum fyri 1. hálvár 2009.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

Klaksvík, hin 20. august 2009

Stjórn

Eyðfinn Reyðberg

Nevnd

John P. Danielsen
*formaður*

Jóannes Hansen
*næstformaður*

Jóhanna á Tjaldrafløtti

Páll Klettskarð

Erling Petersen

Finn Kjølbro

Julianna Thomsen

Eyðun Nolsøe

Guðrið L. Olsen



## RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR

| Viðm. | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 73.808 | 73.520 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 45.167 | 41.179 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **28.641** | **32.341** |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum | 123 | 1.420 |
| | Kostnaður og provisjónsinntøkur | 3.742 | 5.300 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisjón | 402 | 505 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **32.104** | **38.556** |
| | | | |
| 3 | Virðisjavnan av virðisbrøvum og útlendskum gjaldoyra | 502 | -5.435 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 802 | 391 |
| 4 | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 27.129 | 26.320 |
| | Avskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 1.633 | 1.924 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 402 | 0 |
| 5 | Niðurskrivingar uppá útlán o.a. | 17.165 | 6.700 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 0 | -499 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **-12.921** | **-1.931** |
| | | | |
| | Skattur | -2.167 | -80 |
| | | | |
| | **Hálvársúrslit** | **-10.754** | **-1.851** |

# FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI

| Viðm. | | 2009 1.000 DKK | 2008 1.000 DKK | Årsendi 2008 1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | | |
| | Kassapeningur og innistandandi í tjóðbankanum | 106.037 | 55.218 | 39.112 |
| | Ogn hjá fíggjarstovnum | 184.441 | 37.972 | 205.949 |
| | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.915.649 | 1.837.567 | 1.844.855 |
| | Lánsbrøv til dagsvirði | 99.952 | 186.582 | 174.700 |
| | Partabrøv | 42.848 | 65.398 | 55.408 |
| | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 2.461 | 0 | 2.461 |
| | Kapitalpartur í tilknýttum fyritøkum | 601 | 11.581 | 601 |
| | Fastognir íalt | 44.695 | 20.604 | 57.548 |
| | Íløguognir | 22.115 | 0 | 39.115 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 22.580 | 20.604 | 18.433 |
| | Aðrar materiellar ognir | 20.317 | 25.010 | 21.798 |
| | Útsettur skattur | 10.508 | 0 | 8.599 |
| | Yvirtiknar ognir | 5.741 | 341 | 5.741 |
| | Onnur ogn | 20.761 | 9.172 | 19.625 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.454.011** | **2.249.445** | **2.436.397** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | | |
| | Skuld til fíggjarstovnar og tjóðbankar | 65.102 | 232.000 | 119.866 |
| | Innlán | 2.082.667 | 1.660.994 | 2.009.083 |
| | Onnur skuld | 34.388 | 22.437 | 20.233 |
| | **Skuld tilsamans** | **2.182.157** | **1.915.431** | **2.149.182** |
| | | | | |
| | **Avsetingar** | | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 2.639 | 2.966 | 2.963 |
| | Avsetingar til útsettan skatt | 747 | 4.578 | 423 |
| | Avsetingar til tap uppá ábyrgdir | 4.207 | 981 | 8.551 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **7.593** | **8.525** | **11.937** |
| | | | | |
| | **Eginpeningur** | | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 6.803 | 7.088 | 7.066 |
| | Gávugrunnur | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| | Uppskrivingargrunnur | 0 | 0 | 6.252 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 267.212 | 319.252 | 315.846 |
| | Hálvársúrslit eftir skatt | -10.754 | -1.851 | -54.886 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **264.261** | **325.489** | **275.278** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.454.011** | **2.249.445** | **2.436.397** |
| | | | | |
| 6 | **Ábyrgdir og aðrar skyldur** | | | |



# VIÐMERKINGAR

| Viðm. | | 2009 1.000 DKK | 2008 1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Renta av innistandandi í peningastovnum | 2.779 | 2.201 |
| | Renta av útlánum | 66.658 | 67.773 |
| | Renta av lánsbrøvum | 4.371 | 3.546 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **73.808** | **73.520** |
| | | | |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Renta til peningastovnar | 582 | 6.488 |
| | Renta til innlán | 43.958 | 34.505 |
| | Renta til ábyrgdarapening | 140 | 186 |
| | Aðrar rentuútreiðslur | 487 | 0 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **45.167** | **41.179** |
| | | | |
| 3 | **Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra** | | |
| | Virðisjavnan av lánsbrøvum | 2.482 | -1.703 |
| | Virðisjavnan av partabrøvum | -1.971 | -3.693 |
| | Virðisjavnan av gjaldoyra | -9 | -39 |
| | **Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra tilsamans** | **502** | **-5.435** |
| | | | |
| 4 | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting** | | |
| | Løn, eftirløn og samsýning til stjórn, nevnd og umboðsráð | 1.551 | 1.409 |
| | Starvsfólkalønir | 8.821 | 8.726 |
| | Eftirløn til starvsfólk og løn til eftirlønt starvsfólk | 1.361 | 1.318 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 721 | 888 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk tilsamans** | **12.454** | **12.341** |
| | | | |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 14.675 | 13.979 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og umsiting tilsamans** | **27.129** | **26.320** |
| | | | |
| | Miðaltal av starvsfólkum | 46,7 | 46,8 |

| Viðm. | | 2009<br>1.000 DKK | 2008<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 5 | **Niðurskrivingar uppá útlán** | | |
| | | | |
| | **Niðurskrivingar uppá einstøk útlán** | | |
| | Niðurskrivingar í árinum | 24.012 | 6.800 |
| | Afturførdar niðurskrivingar í árinum | -3.790 | 0 |
| | Niðurskrivingar í árinum tilsamans | 20.222 | 6.800 |
| | | | |
| | **Niðurskrivingar uppá lánibólkar** | | |
| | Niðurskrivingar í árinum | 0 | 0 |
| | Afturførdar niðurskrivingar í árinum | -3.087 | 0 |
| | Niðurskrivingar í árinum tilsamans | -3.087 | 0 |
| | | | |
| | Avskrivað, ikki niðurskrivað | 35 | 0 |
| | Inngingið áður avskrivað | -5 | -100 |
| | **Niðurskrivingar uppá útlán tilsamans** | **17.165** | **6.700** |
| | | | |
| 6 | **Ábyrgdir og aðrar skyldur** | | |
| | Ábyrgdir o.a. | 39.718 | 283.935 |
| | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 6.163 | 17.312 |
| | Aðrar skyldur | 26.628 | 0 |
| | **Ábyrgdir og aðrar skyldur tilsamans** | **72.509** | **301.247** |

www.ns.fo